Sosialurin



## Pápin skeyt børnini

Líkini av fimm børnum vórðu í gjár funnin á einum parkeringsplássi í amerikanska statin Washington. Børnini, sum vóru systkin, vóru skotin. Tað var eitt skyldfólk hjá børnunum, sum varnaðist sorgarleikin. Fýra børn lógu deyð í songini, og tað fimta lá í baðirúminum. Talan var um fýra gentur og ein drong. Løgreglan í Washington ivast ikki í, at tað var pápin, sum skeyt børnini. Hann varð seinni funnin deyður í bili sínum. Løgreglan sigur, at hann hevði skotið seg.

## Ráðharri eftirlýstur

Myndugleikarnir í Sameindu Arabisku Emiratunum hava givið boð um, at varaforsætisráðharrin í Kekenia, Adam Delimkhanov, skal handtakast, tí hann er undir illgruna fyri at hava verið við til at beina fyri kekenska andstøðupolitikaranum Sulim Jamadajev. Løgreglan í Dubai sigur, at seks menn eru undir illgruna í sambandi við morðið, og at tveir teirra eru longu í varðhaldi. Jamadajev bleiv skotin í einum parkeringshúsi í Dubai tann 28. mars, og russar leggja kekenska forsetan, Ramzan Kadyrov, undir at beina fyri sínum mótstøðumonnum. Jamadajev var ein teirra.



# Fiskimálaráðharrin má ikki at sleppa at knúsa Fiskamarknaðin Føroya



**- Fiskamarknaður Føroya er størsta frambrot í føroyskari fiskivinnu í nýggjari tíð, og eg dugi onga meining at síggja í, at Jacob Vestergaard nú skal leggja upp til at knúsa hesa skipan, ið hevur havt so stóran týdning fyri okkara fiskivinnu, bæði á sjógvi og landi. Vit eiga ikki at taka av treytina um góðkenda uppsølu fyri fisk, sum fer óvirkaður av landinum, men eg havi einki ímóti, at skip í størri mun kunnu selja sína veiði uttanlands, tí tað avmarkar seg sjálvt, sigur Kári Hansen, sum bæði er fyrrverandi fiskaseljari og reiðari**

FISKAMARKNAÐUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Kári Hansen hevur í síni tíð sum fiskaseljari og reiðari selt nógvar fiskalastir av landinum, bæði í bingjum og fisk, sum er beinleiðis landaður á eitt nú skotska marknaðinum.

Hann heldur lítið um hugskotið at loyva sølu av føroyskum fiski, sum verður landaður í Føroyum og verður fluttur óvirkaður av landinum, uttan um skipanina hjá Fiskamarknaði Føroya (FMF).

- Mær dámar ikki sjónarmiðini, sum landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, hevur latið uppfyri í hesum sambandi. Líkt er til, at hann vil sleppa kravinum um, at nøkur fiskasløg, sum verða landað í Føroyum og verða seld óvirkað av landinum, kunnu fara uttan um FMF. Eg dugi ikki at síggja, at FMF er trupulleikin í hesum sambandi, tí klára reiðarar ella útflytarar ikki tey 0,75%, sum Fiskamarknaðurin tekur í sølugjaldi, klára teir seg neyvan kortini. Tað kann ikki vera hetta prosentgjald, sum ger allan munin.

### Lítil partur

Kári vísir á, tá skip og bátar landa í Føroyum, hava tey í fyrsta lagi útreiðslur av landing og kassaleigu, og haraftrat kemur havnagjald. Skal fiskurin koyrast, kostar tað eisini pening.

- Sjálv sølan um góðkenda uppboðssøluskipan er ikki hon, sum ger fiskin nakað serligt dýrari. Hetta er ein skipan, har fiskaseljarin veit, at hann fær peningin at kalla beinanvegin. Øðrvísi kann ganga, tá selt verður til útlendskar keyparar, leggur hann aftrat.

Í morgun, tá Sosialurin tosaði við Fiskamarknað Føroya, fingu vit upplýst, at seljarar í fjør rindaðu í miðal eini 10 oyru fyri kilo fyri søluna.

- Í ár, nú fiskaprísurin hevur verið lægri, er sølugjaldið soleiðis eisini uppaftur minni. Sølugjaldið er 0,75% av søluvirðinum, og tað merkir, at liggur miðalprísurin fyri kilo á umleið 10 krónum, er sølugjaldið 0,75 oyru fyri kilo, siga tey á FMF.

Skip og bátar kunnu selja sína veiði, sum fer til virkingar í Føroyum, til góðkend fiskavirkir, men skal fiskurin seljast óvirkaður av landinum, er galdandi treytin hon, at veiðan fyrst skal um góðkenda uppboðssølu í Føroyum.

Haraftrat er skipanin hon, at skip kunnu sigla av landinum við upp til 25% av sínari veiði í hvørjum ársfjórðingi.



*- Allir keyparar eiga at varðveita sín møguleika at bjóða upp á fisk, sum verður landaður í Føroyum. Hetta geldir ikki bara føroyskar keyparar, men eisini útlendskar, um teir hava hug at bjóða seg fram, sigur Kári Hansen, sum heldur, at Fiskamarknaður Føroya er størsta frambrot innan føroyska fiskivinnu í nýggjari tíð*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Gjarna sigla

Kári Hansen sigur seg einki hava ímóti, at skip kunnu sigla av landinum við heilum fiski, tí við sínum royndum á hesum øki heldur hann, at hetta avmarkar seg sjálvt.

- Landsstýrismaðurin kann gjarna avtaka hámarkið upp á tey 25% fyri sølu uttanlands, men eg haldi avgjørt ikki, at treytin um sølu á góðkendari uppboðssølu fyri fisk, sum fer heilur av landinum, eigur at broytast.

Við atliti til avmarkaða sølukostnaðin, sigur hann seg onga meining duga at síggja í avtøku av hesi treyt.

Kári stúrur tó fyri, at landsstýrismaðurin fer at avtaka hesa treyt, tí hetta kann hann gera bara við eini kunngerð.

- Eg dugi bara slett ikki at síggja nakra sum helst meining við hesum, tí hetta tænir ongum.

Fyrrverandi reiðarin og fiskaseljarin heldur, at allir keyparar eiga at varðveita sín møguleika at bjóða upp á fisk, sum verður landaður í Føroyum.

- Allir keyparar eiga at hava sama møguleika. Hetta geldir ikki bara føroyskar keyparar, men eisini útlendskar, um teir hava hug at bjóða seg fram.